# Enekk á konsertferð

Í døgunum 21.- 27. mars fer bólkurin Enekk á eina konsertferð í Føroyum, Finnlandi, Álandi og Danmark. Nýggja fløgan hjá Enekk, »Meðan vit nærkast jørðini«, kom út fyri stuttum, og tað verða m. a. sangir og løg av hesari fløguni, ið verða at hoyra á konsertunum. Spælt verður eisini tilfar av hinum trimum fløgunum og tilfar, ið ikki er tikið upp ella útgivið.

Við í hópinum vera Kári Sverrisson, sang og kassagittar, Óli Olsen, klaver, Agnar Lamhauge, kontrabass, Rógvi á Rógvu, trummur og ásláttur, og Heðin Z. Davidsen, el-gittar.

Konsertirnar vera:
Sunnukvøldið 21. mars, kl. 20 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði
Mánakvøldið 22. mars, kl. 19.30 í Norðurlandahúsinum (saman við Afenginn)
Mikukvøldið 24. mars Savoy Theater, Helsinki/Finnlandi
Hóskvøldið 25. mars Marieparken, Mariehamn/Álandi
Leygarkvøldið 27. mars, kl. 20
Bryggen, Keypmannahavn/Danmark.

# Gongutúrur við Parkinsonfelagnum



*Tað er serliga gott hjá teimum, ið hava parkinsonsjúku at røra seg. Tí er Parkinsonfelagið farið at skipa fyri regluligum gongutúrum*

– Parkinsonfelagið skipar nú fyri gongutúrum.

Hetta sigur nevndin í felagnum. Fyrsti túrurin var farna leygardag. Hóast veðrið ikki var av tí besta, tarnar hetta als ikki parkinsonfelagnum.

Ætlanin er at fara nakrar gongutúrar í Havn og kanska seinni túrar uttan fyri Havnina.

Eins og fyri øll onnur er tað serliga gott hjá teimum, sum hava parkinsonsjúkuna at strekkja sær vøddarnar og fyribyrgja, at teir ikki gerast ov stirvnir.

– Ein av dagligu uppgávunum hjá parkinsonsjúklingum er at røra seg, og tá ein kann fara saman við øðrum og samstundis fáa eitt hugnaligt – og sum henda dagin – eisini sera skemtiligt prát, ja, so er ikki at halda seg aftur, siugr felagið.

Parkinsonfelagið vónar, at hetta tiltak fer at festa røtur og fáa undirtøku.

# Fyrilestur á Klaksvíkar bókasavninum



Týskvøldið 23. mars kl. 19.30 heldur Jóan Pauli Joensen fyrilestur á Klaksvíkar bókasavni um brúdleypssiðir í Føroyum.

Jóan Pauli Joensen er dr. phil og professari á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum. Stutt fyri jól í fjør kom út bók hjá Jóan Paula Joensen »I ærlige brudefolk«, sum er ein siðsøgulig lýsing av brúdleypi í Føroyum frá umleið 1500 til 2002. Í bókini verður greitt frá giftarmáli og brúdleypi og teirri siðvenju, ið hevur verið knýtt at hesum, og hvussu siðirnir eru broyttir.

Í fyrilestri sínum fer Jóan Pauli Joensen at greiða frá bókini og teimum siðum, ið verða settir í samband við brúdleyp í Føroyum.

Høvi verður hjá áhoyrarunum at seta spurningar. Eftir fyrilesturin bjóðar bóka-

# 419 bilar missa pláturnar

**Bileftirlitið fer nú at senda løgregluna at taka nummarpláturnar av 419 bilum, sum ikki hava goldið vegskatt rættstundis**

VEGSKATTUR
*Eirikur Lindenskov*

Tvær ferðir um árið fellur vegskatturin, ið so at siga øll akfør í landinum skulu rinda til tess at hava loyvi at koyra á føroysku vegunum.

Men tvær ferðir um árið kemur eisini tíðindaskrivið frá Bileftirlitinum, har gjørt verður vart við, at alt ov nógv fólk »gloyma« at rinda vegskattin til tíðina, og tískil verður løgregan send eftir nummarspjøldrunum.

Dagurin í gjár var ein av hesumdøgum. Bileftirlitið læt politistøðunum kring landið 419 mál um vegskattaeftirstøður fyri fyrra hálvárið í ár.



*419 bilaeigarar eru í vanda fyri at missa nummarpláturnar. Men verður vegskatturin goldin ein av næstu døgunum, so slepst undan…*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Kann bileigarin ikki vísa fram kvittan fyri goldna vegskattaeftirstøðu, verða nummarspjøldrini tikin av bilinum, verður sagt av Bileftirlitinum.

# Maskinmeistarar aðalfund

AÐALFUNDUR
*Tíðindaskriv*

Maskinmeistarafelagið hevði aðalfund leygardagin tann 13. mars.

Á skránni var m. a. nevndarval.

Fyri vali til nevndina stóðu Zacharias Zachariassen og Jóan Petur Patursson, ið ikki tók við afturvali.

Nývaldir í nevndina vóru Páll Hansen og Petur Egholm.

Sum tiltakslimir vóru valdir Zacharias Zachariassen og Jørgin Mørkøre.

Nevndin í Maskinmeistarafelagnum er nú soleiðis skipað:

Jógvan Nybo, Viðareiði er formaður

Páll Hansen, Tórshavn er næstformaður

Regin Olsen, Klaksvík, Petur Egholm, Tórshavn og Marner Olsen, Vestmanna eru nevndarlimir.



*Jógvan Nybo er formaður í Maskinmeistarafelagnum*

# Forkunnugar solistkonsertir

**– í Fríðrikskirkjuni, Vesturkirkjuni og Fuglafjarðar Kirkju um vikuskiftið**

KONSERT
*Tíðindaskriv*



Nú um vikuskiftið verða forkunnugar konsertir við solospæli bæði upp á orgul og flygil í Fríðrikskirkjuni á Toftum, í Vesturkirkjuni í Havn og í Fuglafjarðar Kirkju.

Tað eru teir báðir sviin Mikael Holmlund og norðmaðurin Stephen Sirris, sum fara at skiftast um at spæla.

Mikael Holmlund er pianistur, byrjaði at spæla klaver í 7-ára aldri, fekk seinni eisini undirvísing bæði í orgul- og fagottspæli og hevur virkað sum organistur í heimbýnum Umeå. 17 ára gamal byrjaði hann tónleikalesnað á Norges Musikhøgskole í Oslo, haðan hann tók diplomprógv við Jens Harald Bratlie og tí heimskenda Einar Steen-Nøkleberg sum lærarum, og seinni fekk hann framhaldandi útbúgving á tónlistháskúlanum í Hannover.

Umframt at hava vunnið klaverkappingar bæði í Noreg, Danmark og Svøríki - nú herfyri vann hann í beinharðari kapping finaluna í Berwaldhallen í Stockholm - hevur Mikael Holmlund havt solokonsertir í Berlin, Brüssel, Salzburg og St. Petersburg.

Hann býr nú í Oslo, har hann umframt sítt kamarmusikalska virksemi og solospæl, eitt nú saman við Bergens Filharmoniske Orkester og Kungliga Filharmoniska Orkestern í Stockholm, eisini er organistur í svensku Margaretakyrkan og inn ímillum er virkarur fyri fagottspælara(!) í Oslo Symfoniorkester.

Stephen Sirris er norðmaður, føddur í 1977, og hevur kirkjumusikalska útbúgving sum kantor frá Norges Musikhøgskole í Oslo. Hann hevur eisini havt lesnaðaruppihald við Universität der Künste í Berlin.

Millum sínar lærarar nevnir Stephen Sirris Jon Lauvik og Leo van Doeselaar í solistiskum orgulspæli og Inger-Lise Ulsrud og Wolfgang Seifen í orgulimprovisatión.

Síðan januar 2001 hevur Stephen verið kantor við tað prýðiligu Østerås Kirke í Oslo.

Umframt eisini sítt kórarbeiði við størri framførslum í egnari kirkju fevnir hansara konsertvirksemi um stóran part av Noregs landi.

Umframt sína tónleikaligu útbúgving er Stephen Sirris eisini prestlærdur og hevur lisið hugmyndafrøði og námsføði við lærda háskúlan í Oslo.

Konsertirnar hjá Mikael Holmlund og Stephen Sirris her á teirra Føroya-vitjan nú um vikuskiftið verða friggjakvøldið kl. 20.00 í Fríðrikskirkjuni á Toftum leygardagin kl. 16.00 í Vesturkirkjuni í Havn og sunnukvøldið kl. 20.00 í Fuglafjarðar Kirkju.



# Føroyar skulu hava nýggja samtykt um verjupolitikkin



*Per Stig Møller, danskur uttanríkisráðharri, hevur onki ímóti, at føroyingar gera eina nýggja hernaðarsamtykt, sum er í samsvari við tíðina, vit liva í*

**Landssýrið er farið undir arbeiðið at gera eitt uppskot til eina nýggja samtykt um ein føroyskan verjupolitikk**

VERJUPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyar skulu nú hava eina nýggja løgtingssamtykt á hernaðarøkinum.

Tað sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Sostatt skulu tær gomlu og illa umstríddu hernaðarsamtyktirnar setast úr gildi og ein nýggj setast í staðin.

Ætlanin er komin so mikið áleiðis, at landsstýrið er farið undir arbeiðið at gera eitt uppskot til eina nýggja hernaðarsamtykt.

Hetta kunnaði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, danska uttanríkisráðharran, Per Stig Møller, um, tá ið teir hittust mikumorgunin.

## Størri ávirkan og innlit

Løgmaður vil ikki viðgera málið í smálutum, tí tað er tað komið ov stutt til.

Men hann sigur, at aðaltátturin í uppskotinum er, at føroyingar skulu hava fáa størri ávirkan á og fáa størri innlit í tær verjupolitisku avgerðirnar, sum verða tiknar, og sum viðvíkja Føroyum.

Hann sigur at ætlanin er at leggja uppskotið fram, áðrenn tingestan endar á Ólavsøku.

Hetta var Per Stig Møller sinnaður at virka fyri.

– Hann sigur, at landsstýrið hevur eisini í fleiri ár arbeitt fyri at fáa eitt orðaskifti um føroyskan verjupolitikk. Men nú er landsstýrið farið eitt stig víðari, og hevur sett gongd á arbeiðið at orða eina nýggja hernaðarsamtykt. Og tað sum landsstýrið ætlar, er at hava eitt aðalorðaskiftið longu í vár og at hetta orðaskiftið skal enda við eini nýggjari løgtingssamtykt um hernaðarmálið.

Jóannes Eidesgaard sigur, at undanfarna samgongan hevði eisini ætlað at havt eitt trygdarpolitiskt orðaskifti. Men semja var ikki um, hvat hetta orðaskiftið skuldi enda við.

## Taka støðuna til eftirtektar

Løgmaður sigur, at heimurin er nógv broyttur síðani hernaðarsamtyktirnar vórðu gjørdar.

– Kalda kríggið er endað og múrurin er fallin og nú verður enntá tosa um eitt NATO- samstarv við Russland.

– Og spurningurin er, hvørja áskoðan vit skulu hava á tað nýggju støðuna.

– Tað ábendingar nú eru um, at møguleiki er fyri, er at fáa eina breiða semju í tinginum um, at vit viðurkenna okkum tann veruleika, vit liva undir og at vit brynja okkum til tíðina, sum kemur.

Hann sigur, at eini nýggjari samtykt eiga fyrst og fremst at taka støðuna til eftirtektar.

Og um vit vilja tað ella eið, hava vit verið partur av vesturlendsku verjuskipanini síðani í 1948- hóast vit ikki eru so nógv eftirspurdir.

Samstundis er tað alt sum bendir á, at NATO londini hava áhuga í, at vit framhaldandi verða partur í hesi samgonguni, so tað vildi verið natúrligt, at vit taka tað til eftirtektar, soleiðis sum støðan er. – Hinvegin er mótpolurin hjá NATO ikki til longur og nú verður enntá tosað um NATO-samstarv við Russland.

– Harafturat er blokkpolitikkurin ímillum eystur- og vestur farin í søguna. Tað, sum nú er meiri átrokandi, er stríðið ímóti altjóða yvirgangi, sigur løgmaður.

## Svartabók og reyðabók eru grundarlagið

Løgmaður sigur, at vit hava viðhvørt verið í teirri støðu, at vit hava ikki kunnað viðgjørt ávís mál, tí tað hevur verið í stríð við gomlu hernaðarsamtyktina og tað er ikki serliga heppið.

Løgmaður vísir á, at vit hava tvær frágreiðingar um Føroyar í kalda krígnum og við teimum báðum sum grundarlag ber til at kjakast um Føroya støðu í kalda krígnum.

– Tað, ið gongur sum ein tráður ígjøgnum hesar báðu frágreiðingarnar, er, at Føroyskir myndugleikar í alt ov lítlan mun hava fingið innlit í og hava kunnað ávirka verjupolitiskar avgerðir, viðvíkjandi Føroyum. Uppskotið um at niðurleggja støðina á Sornfelli og ætlanin at byggja út á Eiði, eru tvey dømi.

Løgmaður sigur, at í eini nýggjari løgtingsamtykt, skal tað gerast greitt, hvussu føroyingar sjálvir vilja hava, at viðurskiftini skulu vera. Og samstundis skal hon staðfesta, at vit vilja hava avirkan á og innlit í tey viðurskifti, sum viðvíkja okkum.


